Ellis- & Avlamisheimið í Vágum

## Hjálparfólk

### søkir til vask og viðlíkahald av búfólkaklæðunum

Søkt verður eftir einum hjálparfólki til at vaska og viðlíkahalda klæðini hjá búfólkunum og starvsfólkabúnarnar til setan 1. september 2006. Arbeiðstíðir er 30 tímar um vikuna.

Vit leggja dent á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, ert røkin, og at tú dugur at seyma.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran, Anna Dánjalsdóttir á tlf. 333600.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

**Ellis- & Avlamisheimið í Vágum**
Att.: Leiðarin
370 Miðvágur

Umsóknarfreistin er 21. august 2006.

Ellis- & Avlamisheimið í Vágum

# Søkir ergoterapeut/Ítrivsleiðara

Eitt starv sum Ergoterapeutur/Ítrivsvegleiðari í setanarbrøki 0,8 er leyst at søkja til setan 1. sept. 06.

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving sum ergoterapeut ella ítrivsvegleiðari
- Hevur hug og hegni at starvast við eldri fólki, og at samstarva tvørfakliga
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og tilrættaleggja dagin í mun til tørvin hjá tí einstaka brúkara
- Opin fyri nýggjum avbjóðingum og møguligum broytingum

**Lønar- og setanartreytir:**
Sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran, Anna Dánjaldsdóttir á tlf 333600

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi og øðrum upplýsingum skulu sendast til:

**Ellis- & Avlamisheimið í Vágum**
Att.: Leiðarin
370 Miðvágur

Umsóknarfreistin er 25. august 2006.

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin

# Leiðandi sjúkrarøktarfrøðingar til Skurð- og Bráðdepilin og til Psykiatriska depilin

2 størv sum leiðandi sjúkrarøktarfrøðingar eru leys at søkja á hesum báðum deplunum til setan ávikavíst 1. oktober 2006 og 1. november 2006 ella eftir avtalu.

Skurðdepilin umfatar sergreinarnar ortopædkirurgi, gynækologi og obstetrik, parenchym kirurgi, urologi og plastikkirurgi, umframt oyrna-, næsa- og hálsasjúkur, eygnasjúkur og tannlæknavirksemi, og í hesum sambandi; kanning, diagnostisering, viðgerð, røkt og rehabilitering av hesum sjúklingabólkum. Deildirnar eru; læknagongd, t.e. yvirlæknar, yngri læknar, læknaskrivarar v.m., skurðseingjadeild (G4), skaðastovu og dagskurðstovu (G1), skurðambulatorium og føðideild (A2).

Bráðdepilin umfatar sergreinina anestesiologi og í hesum sambandi; kanning, diagnostisering, viðgerð og røkt av hesum sjúklingabólki. Deildirnar eru; anestesideildin og bráðdeildin, sum hevur bráðmóttøku, viðrakning og intensiva eind, virksemið í forhøllini og sjúkraflutningstænastuna.

Psykiatriski depilin umfatar sergreinina psykiatri og í hesum sambandi; kanning, diagnostisering, viðgerð, røkt og rehabilitering av hesum sjúklingabólkum. Deildirnar eru; læknagongd, t.e. yvirlæknar, yngri læknar, sálarfrøðingar, sosialráðgevarar og læknaskrivarar, seingjadeildirnar, ambulatorium, økispsykiatri og bústovnin á Bóndaheygi.

**Ábyrgdarøki:**
Á Landssjúkrahúsinum er ein trýdeild leiðsla, sum hevur yvirskipaða ábyrgd av samlaða rakstrinum. Leiðandi sjúkrarøktarfrøðingurin hevur ábyrgdina fyri tí dagligu leiðsluni av deplinum í samstarv við leiðandi yvirlæknan, sum hevur endaligu fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina fyri rakstrinum av deplinum. Leiðandi sjúkrarøktarfrøðingurin hevur sjúkrarøktarfakligu ábyrgdina í deplinum.

**Arbeiðsuppgávur:**
Leiðandi sjúkrarøktarfrøðingurin skal saman við leiðandi yvirlæknanum, fyri øll starvsfólk, sum eru sett á deildini:
- Standa fyri starvsfólkaleiðslu og menning
- Planleggja, samskipa og stýra arbeiðsgongdum, arbeiðstilrættaleggjan og tilfeingisnýtsu, soleiðis at veitt verður so munadygg tænasta til brúkaran sum gjørligt innanfyri teir til eina og hvørja tíð galdandi fíggjarkarmar
- Tryggja innan- og uttanhýsis samstarv og samskifti
- Tryggja neyðuga fakliga menning

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving og autorisatión sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Víðariútbúgving/eftirútbúgving innan sjúkrarøkt
- Útbúgving og royndir innan leiðslu og fyrisiting, helst á fleiri økjum innan sjúkrahúsverkið
- Kliniskar royndir innan avvarðandi øki
- Hava góð leiðslu- og samstarvsevni
- Hava góð analytisk evni og vera framskygd/ur
- Vera sinnað/ur til framhaldandi at menna sín leiðsluførleika
- Hava hug og evni til at starvast í eini depilsleiðslu, sum byggir á, at avgerðir verða tiknar í samstarvsanda
- Vera før/ur fyri at virka í broytingartíðum
- Hugflog og royndir innan fakliga menning

**Lønar- og setanarviðurskifti** eru sambært sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið. Størvini eru áramálssetanir fyri eitt tíðarskeið uppá 6 ár við møguleika fyri at verða longd eftir umsókn.

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja til telefonnr. 304500 og tosa við ein av niðanfyri nevndu:

Sjúkrarøktarstjórin, Marin Vang, lokal 1003, t-postur: marinv@lsh.fo
Virkandi leiðandi yvirlæknin á Skurðdeplinum, Harri G. Gudmundsson, lokal 5124, t-postur: hagu@lsh.fo
Leiðandi yvirlæknin á Bráðdeplinum, Hans Jákup Simonsen, lokal 5700, t-postur: hansjs@lsh.fo
Læknafakliga depilsleiðarin á Psyk. deplinum, Tormóður Stórá, lokal 4113, t-postur: tosh@lsh.fo
Verandi leiðandi sjúkrarøktarfrøðingurin á Psyk. depilinum, Bergit Weihe, lokal 4102, t-postur : bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 28. august 2006 kl.12.00.

**Skivlig umsókn** merkt »umsókn til starv« við CV, avrit av prógvum, autorisatión, o.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**

Lønar- og starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820

# Summarfrí

Kommunuskrivstovan verður stongd fyri avgreiðslu í viku 32.

Opið verður aftur týsdagin tann 15. august.

Götu Kommuna